# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 10.01.2017 kl. 17.00

Á fundi: Janus Thomsen
Trúgvi Gudmundarson
Niels Jacob Thomsen
Magni Bertholdsen
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen

Ikki møtt:

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Suðuroyar Svimjifelag.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 10.000,-.

2. **Umsókn um lýsingarpening til borðspælið Herferð.**
   Talan er um eitt føroyskt borðspæl, har Føroyakortið verður brúkt sum bretti og eru upplýsingar um føroyskar bygdir og býir á. Um Hvalbiar Kommuna gerst partur av hesum, fær hon økini Hvalba, Sandvík og Lítlu Dímun á borðspælinum og er kostnaðurin kr. 20.000,-. Samtykt varð einmælt ikki at verða við í verkætlanini.

3. **Uppskot um bygdarráðsfundir í 2017.**
   Samtykt varð einmælt at taka undir við uppskotinum um fundir í 2017.

4. **Val av ymiskum nevndum, garðaskoðarum v.m.**
   Nevndirnar eru valdar fyri tíðarskeiðið 01.01.2017 til 31.12.2020. Einmælt samtykt at verandi umboð, ið ikki hava sagt seg frá, halda fram.
   - Kommunuvalnevndin í Hvalba
     Súsanna Niclasen, form.
     Niels Pauli Olsen
     Sunrid Olsen
     Varalimir: Poul Laust Christiansen – Poula Thomsen – Halltóra Joensen

- <u>Løgtings- og Fólkatingsvalnevndin í Hvalba</u>:
  Katrin Joensen, form.
  Otto West
  Magni Bertholdsen
  Varalimur: Poula Thomsen
- <u>Kommunu-, løgtings og fólkatingsvalnevndin í Sandvík</u>
  Thorbjørn Joensen
  Richard á Hólum
  Emmy Klettheyggj, einmælt samtykt
  Varalimir: Andrass N. Joensen – Sverri Jacobsen – Jenny Olsen, einmælt samtykt
- <u>Garðaskoðarar í Hvalba</u>
  Thorstein Thomsen
  Johan Nónstein
  Claus Olsen
  John Hammer
- <u>Garðaskoðarar í Nesi</u>
  Magni Bertholdsen
  Róin Schrøter
- <u>Garðaskoðarar í Sandvík</u>
  Niels Mørk Borgardal
  Snorri Thomsen
  Richard á Hólum
- <u>Vatnsýnisnevndin í Hvalba</u>
  Evald Holm
  Even Eyvindsson
  Vilmund Michelsen, einmælt samtykt
  Varalimur: Signar Olsen, einmælt samtykt
- <u>Vatnsýnisnevndin í Sandvík</u>
  Tummas Thomsen
  John Kjærbo
  Steen Spange Larsen
  Varalimur: Áki Bertholdsen
- <u>Musikkskúlin í Suðuroy</u>
  Otto West
  Varalimur: Jens Mortan Mortensen
- <u>Felags Barnaverndarnevndin í Suðuroy</u>
  Sylvia Poulsen Thomsen
  Varalimur: Emmy Klettheyggj

- Brunanevndin hjá Tvøroyrar Kommunu
  John Hammer
  Varalimur: Trúgvi Gudmundarson
- Bygginevnd dagstovnur:
  Samtykt við 6 atkvøðum fyri at velja Magna Bertholdsen í nevndina fyri John Hammer, ið hevur sagt seg úr nevndini.

5. **Skriv viðvíkjandi høli til Sernám í Suðuroy.**
   Síðani 1. apríl 2016 hevur Sernám ikki havt fast høli í Suðuroynni. Vágs Kommuna og Magnus Hansen hava víst á fyrrverandi skrivstovuhølini hjá SEV í Vági. Samtykt varð einmælt at taka undir við, at Sernám flytir í hesi hølini.

6. **Skriv viðv. koyring til eldrafimleik várið 2017.**
   Samtykt varð einmælt at játta koyring til eldrafimleik kr. 400 um vikuna várið 2017.

7. **Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd (framløga Niels Olaf Eyvindsson):**

- Rottuoyðing: Nevndin mælir til, at keyptar verða 3 rottufellur av slagnum ”Goodnature 24”. Einmælt samtykt.
- Vatnveiting undan Rókunum: Nevndin mælir til, at heitt verður á Kristian Stórhamar um ráðgeving og tilrættalegging í sambandi við arbeiðið at grava fyri vatnleiðing undan Rókunum. Hetta varð einmælt samtykt.
- Spillivatnsskipanin: Samtykt varð einmælt eftir tilmæli frá nevndini at heita á Kristian Stórhamar um ráðgeving í sambandi við kloakkviðurskiftini, her verður serliga hugsað um, hvussu spillivatnsskipanin verður framd í verki
- Gøtuljós: Kunnað varð um, at tveir gøtupelar eru brotnir av og eini 10 – 12 í vánaligum standi. Samtykt varð at beina málið í Fíggjarnevndina.
- Ljós til minnissteinar og minnisvarðar: Kunnað varð um, at nevndin kannar møguleikan at seta ljós á minnissteinar og minnisvarðar í sóknini.

**Vega- og havnanevnd (framløga Trúgvi Gudmundarson):**

- Tilboð viðv. taki á skúri á Hamranesi: Samtykt varð einmælt at beina málið í Fíggjarnevndina.
- Kápulgrøv á havnarlagnum: Nevndin mælir til at umvæla og møguliga seta eitt nýtt U jarn í fyrru kápulgrøvina á havnarlagnum og at havnameistarin átekur sær at gera arbeiðið. Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum.

- Økið við flakavirkið: Partur av økinum við flakavirkið er illa farið og krevur í fyrsta umfari ábøtur. Samtykt varð eftir tilmæli frá nevndini, at havnameistarin ger hesar ábøtur. Síðani verður kannað, hvussu hetta verður gjørt av nýggjum.

**Trivnaðarnevnd (framløga Eir J. Norðberg)**

- Roynhøllin – nýtt tak: Nevndin hevur umrøtt nýtt tak á Roynhøllina, tá mett verður, at hetta er átroðkandi neyðugt. Samtykt varð einmælt, at Eir J. Norðberg fær Hans Haraldsen frá HMP Consult at koma við einari støðumeting.
- Ungdómshús: Nevndin hevur tosað um, hvar eitt møguligt ungdómshús kann vera. Arbeitt verður víðari við at kanna hølir v.m.

**8. Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 22.00

Janus Thomsen Trúgvi Gudmundarson Magni Bertholdsen Niels J. Thomsen

Niels Olaf Eyvindsson Gunnhild Mortensen Eir J. Norðberg